# Pengarnir freistaðu Per at selja

**Framleiðslufelagið Blu, sum føroyski Per Zachariassen var annar av eigarunum av, er selt til altjóða felagið FremantleMedia, og Per Zachariassen, sum framvegis eigur ein lítlan part í felagnum, viðurkennir, at tilboðið var ov gott til at siga nei til**

SJÓNVARP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Framleiðslufelagið Blu Entertainment hevur seinnu árini havt óvanliga stóra framgongd í donsku miðlaverðini. Felagið mennir og framleiðir sjónvarpsundirhald, og annar av eigarunum í felagnum hevur verið føroyski Per Zachariassen.

Nú hava Per og samstarvsfelagið hansara, Henrik Hancke Nielsen, selt teirra succesfyritøku til eitt altjóða felag, sum teir hava samstarvað nógv við.

– Vit hava selt meginpartin av Blu, men vit halda tó fram at starvast í felagnum, og í grundini halda vit, at vit nú hava styrkt Blu og syrgt fyri, at arbeiða hjá okkum verður meira støðugt, sigur Per Zachariassen.

Tað verður ikki upplýst, hvussu nógv FremantleMedia hevur goldið fyri tey 80 prosentini av Blu, men talan er um eina milliónaupphædd, sum eisini kemur gomlu partaeigarunum til góðar.

– Jú, pengarnir vóru eisini ein viðvirkandi orsøk til, at vit seldu felagið. Tilboðið var næstan ov gott at siga nei til, sigur Per Zachariassen.

## Ein kvik successøga

Blu Entertainment hevur verið virkið síðani apríl mánaði 2001. Felagið byrjaði mest sum frá ongum, men er síðani blivið ein risi í donsku undirhaldsverðini og hevur eisini selt sjónvarpskonsept til útlandið.

Blu hevur ment sjónvarpsundirhald sum »Stóra Klassafestin«, »Vinir fyri lívið« og »Tað fullkomnað brotsverkið«, og felagið hevur eisini framleitt sendirøðir sum »Idols«, »Stjørna eitt kvøld« og »Boksina« – stutt sagt lætt undirhald til familjuna í bestu senditíð.

Slíkt eru tað pengar í, og FremantleMedia, sum allatíðina hevur verið ein samstarvspartur hjá Blu, hevur hildið eitt vakið eyga við felagnum, og nú valdi Fremantle at sláa til og keypa felagið hjá Henrik Hancke Nielsen og Per Zachariassen.

FremantleMedia selir sjónvarpssendingar til 150 long kring heimin. Felagið er framleiðslufelagið hjá RTL Group, sum er størsta sjónvarps- og útvarpsfelagið í Europa. Og nú hevur Fremantle eisini lagt Blu undir seg, og ætlar at brúka Blu sum jarnbrot á norðurlendska marknaðinum.

## Halda fram í Blu

Leikluturin hjá Per Zachariassen er ikki av í Blu, nú Fremantle hevur keypt meginpartin av felagnum.

– Eg havi gjørt ein fimm ára sáttmála við Blu, og tí heldur arbeiðið hjá mær fram í Blu. Vit halda fram at menna og framleiða sjónvarpssendingar, og nú verða uppgávurnar meira støðugar, tí alt, sum Fremantle skal gera í Danmark, verður í framtíðini framleitt av Blu, sigur Per Zachariassen.

Hann heldur fram í leiðsluni í felagnum, og tað sama ger Henrik Hancke Nielsen, sum hevur verið stjóri. Teir báðir eiga framvegis ein lítlan part av Blu.

– Tann einasti munurin er, at nú er Fremantle komið rættiliga inn í samstarvi við øllum teimum møguleikum, sum tað hevur við sær, sigur Per Zachariassen.

# Páll blæsur egnar tónar

**Tónleikarin Páll Sólstein fær nú sín elddóp sum tónasmiður. Hann hevur skrivað løg til yrkingar hjá kendum føroyskum yrkjarum, og sangirnar fara Karl Martin Samuelsen og Aldubáran at framføra í Klaksvík og í Havn um vikuskiftið**

KONSERTIR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Páll Sólstein hevur skrivað tónleikin, Aldubáran spælir, og Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen syngja. Spennandi konsertir verða í Klaksvík og í Havn um vikuskiftið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Páll Sólstein hevur seinnu árini verið ein av fremstu føroysku tónleikarunum á klassiska økinum. Hann spælir valdhorn, er útbúgvin á konservatorii í Keypmannahavn og hevur í nógv ár starvast á Kongaliga Kapellinum – nú best kent sum Operahúsið hjá Maersk.

Páll Sólstein hevur ikki verið virkin tónasmiður, hann hevur fyrst og fremst spælt tónleik hjá øðrum, men nú traðkar hann inn á tónleikapallin sum komponistur.

– Eg vil ikki kalla meg tónaskald. Eg havi gjørt nøkur løg, og tað er í grundini ikki so serligt, sigur Páll Sólstein beskeðin.

Hann hevur skrivað løg til yrkingar hjá William Heinesen, Hans Andrias Djurhuus, Christian Matras, Tummas Napoleon Djurhuus og Steintór Rasmussen.

Um vikuskiftið verða hesir sangir framførdir av Aldubáruni við Karl Martini Samuelsen sum sangara. Fyrra konsertin verður í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið, og tann seinna í Havn sunnudagin.

## Fekk yrkingasøvn frá dana

Byrjanin til konsertina við tónleiki hjá Páll Sólstein, sum nú verður veruleiki, var fyri nøkrum árum síðani, tá ið Páll fekk nakrar bøkur frá einum donskum tónleikara, sum plagar at spæla við í Føroya Symfoniorkestri.

– Hann gav mær ein posa við nøkrum føroyskum bókum og bæð meg hyggja eftir teimum. Hann ruddaði, tí hann skuldi flyta, og um eg ikki vildi hava bøkurnar, so kundi eg koyra tær burtur, segði hann.

– Í posanum vóru millum annað fýra signerað yrkingasøvn hjá Christiani Matras. Abbi tann danska tónleikaran var málfrøðingur, og hann var vinmaður við Christian Matras. Eg fór at lesa í yrkingasøvnunum og fekk hug at gera lag til onkra yrking, greiðir Páll Sólstein frá.

Tað gjørdist byrjanin til tann tónleikin, sum um vikuskiftið verður spældur av Aldubáruni.

## Persónligt at avdúka løg

Páll Sólstein hevur ikki áður skrivað løg til almenningin, men hann hevur roynt flogið í tí privata.

– Eg havi skrivað løg, sum eg havi lagt til síðis, tí eg havi ikki verið nøgdur við tey, men eg havi eingi løg havt frammi alment, sigur hann.

Páll er tó fegin um, at hann nú hevur arbeitt meira miðvíst við sínum egna tónleiki.

– Tað hevur verið spennandi at gjørt hesi løgini, og eg havi fingið nógv burtur úr. Tú ert ikki sørt fegin, tá ið tú hevur gjørt eitt lag, sum tú ert nøgdur við, og tú ert glaður fyri, at onnur hava koyrt undir teg fyri at skriva løgini, sigur Páll.

Hann hevur arbeitt nógv saman við Karl Martin Samuelsen, meðan hann hevur skrivað og arrangerað.

– Tað er øgiliga persónligt at avdúka løg fyri øðrum fólkum, og tí hevur tað verið lættari hjá mær at spælt sangirnar fyri Karl Martin, tí eg kenni hann væl, og eg havi allatíðina ætlað, at hann skuldi syngja sangirnar.

Anna Maria Olsen skal eisini syngja onkran sang, og henni hevur Páll eisini arbeitt saman við áður.

## Aldubáran og Karl Martin

Tvær konsertir verða við Aldubáruni og Karl Martin Samuelsen. Tann fyrra verður í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið kl. 21.00, og tann seinna verður í Havn sunnudagin.

Tónleikararnir í Aldubáruni til hesa konsertina eru: Andrea Heindriksdóttir, floyta, Jógvan Zachariassen, fagott, Sámal Petersen, violin, Andras Olsen, trombon, Ólavur Olsen, trompet, Ólavur Jakobsen, guitar, Arnold Ludvig, bass og Stamen Stantchev, keyboards. Eisini syngur Anna Maria Olsen

Umframt tónleikinum, verður eisini frásøgn um yrkingarnar, og hesum fer Andrass Sólstein at taka sær av.